## Vit mugu vera við í útlandinum

OLJUMESSA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

-Um føroyingar longu sjálvir hava mist mótið uppá eina komandi oljuvinnu, hvussu skulu so útlendsku oljufeløguni hava tað. Nógvar føroyskar fyritøkur brúka alt for nógvar pengar til at reklamera fyri sær sjálvum í føroyska dunnihylinum. Postkassin er á tremur við reklamu hvørja viku, veit ikki hvussu nógv tað gevur sigur Eli Lassen, stjóri í Atlantic Supply Base í Runavík.

-Um vinnufyritøkur brúkti 75% av pengunum uttanlanda, so vóru nógvar føroyskar fyritøkur undirveitarar til oljuvinnuna. Havi verið á 3 messum uttanlanda, og tað er so sera nógv lættari at hitta fólk face to face, alt fellur lættari, tá ið tú ringir til tey, ella tey ringja til tín.

Tað má ikki henda, at tann føroyski básurin verður niðurlagdur. Tað kann vera at 25.000 kr eru nógvir pengar at gjalda fyri at lutaka á einum bási. Hvat hava 25.000 kr. at siga um tú kemur í samband við teir røttu persónanar og møguliga fært ein millióna sáttmála.

Føroysk virkir kunnu ikki sita hendur í favn og bíða eftir útlendingunum. Føroyingar kunnu heldur ikki rokna við at fáa útlendingar hendan vegin, um føroyingar ikki fara uttanlanda. Hvat skulu føroyingar gera, um Eni finnur olju í komandi vár. Tá blivur fullur panikkur sigur Eli Lassen.

-Tað arbeiði, sum Samvit/oljuvinnufelagið hava gjørt er ikki at forsmáa, tey hava stóra tøkk uppiborið, tey hava bara ov lítið av pengum at arbeiða við. Tað skuldi ikki verið so ringt at skaffa 200-215.000 kr fyri ein bás. Oljufeløguni gjalda jú avgjøld fyri loyvir og annað. Tað er ein felagsskapur av oljufeløgum í Føroyum, sum eitur FOIB, hetta skuldi verið ein møguleiki hjá teimum at hjálpt til. Hetta skuldi bara verið hjálp til sjálvhjálp, jú fyrr føroyskar fyritøkur koma á banan, jú skjótari er tað hjá oljufeløgum at avgreiða smáting í Føroyum.

Bara tað at føroyskar fyritøkur koma burturúr Maniana politikkinum so er val sloppi.

Maniana merkir í morgin/seinri. Innan oljuvinnuna merkir kl. 0800, klokkan 8, og ikki kl. 0830 sigur Eli Lassen.

# Fara kortini til oljumessu í Aberdeen

**Føroysk virki fara nú kortini til oljumessu í Aberdeen í september. Eitt skifti sá út til, at føroyska luttøkan mátti avlýsast, tí so fá virki høvdu teknað seg. Nù er avgjørt at minka um støddina á básinum og verður luttøkan tí bíligari.**

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



Føroysk virki hava luttikið á oljumessum í Noregi og Skotlandi síðani fyrst í 90-unum. Í september er aftur ráðstevna í Aberdeen, men tað hevur víst seg, at alt ov fá virki hava teknað seg. Tí vóru útlit til at føroyingar fyri fyrstu ferð í meira enn 15 ár ikki fóru at luttaka á oljumessu. Unn Poulsen frá Uttanríkisráðnum sigur við Sosialin, at tey nú hava fingið eina aðra loysn, har tey hava minkað um støddina á básinum. Higartil hava fýra virki og kommunur teknað seg og Unn Poulsen sigur, at møguleiki er framvegis hjá øðrum at tekna seg. Nú verður so plássið minni, 15 m2 stil støddar, men tað hevur mest at siga at hava eitt stað at leggja tilfar og hava fundir í. So tann tørvurin verður nøktaður sigur hon. Offshore Europe 2009 í Aberdeen verður í døgunum 8. – 11. september. Tey, ið higartil hava teknað luttøku eru: Runavíkar Kommuna, Atlantic Supply Base, Atlantic Airways og Føroya Tele.

Ein av høvuðsorsøkunum til lítla áhugan hjá føroyskum virkjum er kreppan, sum hevur gjørt, at fleiri virki heilt hava strikað luttøku á messum í ár. Eisini hevur lítla virksemi í oljuleitingini gjørt sítt til, at virkini hava ikki eins stóran áhuga.

Tað er Sansir, sum stendur fyri básinum. Unn Poulsen sigur, at tað altíð er størri áhugi fyri messuni í Stavanger og hava fleiri sagt seg vilja vera við har í næsta ár. Messurnar skifta millum hesar býirnar annaðhvørt ár.

Framsýningin í heyst í Aberdeen er millum heimsins størstu av sínum slagi, og er eitt sera gott høvi hjá føroyskum veitarum til oljuvinnuna at bjóða fram sínar vørur og tænastur, at hitta samstarvspartnarar, endurnýggja avtalur og at finna nýggjar marknaðarmøguleikar. Nærri upplýsingar um OE 2009 eru at finna á heimasíðuni www.offshore-europe.co.uk ella við at seta tykkum í samband við Uttanríkisráðið.

Konseptið og uppskotið frá Sansum verður lagt fram á fundi seinnu helvt av juni har eisini verður kunnað um luttøkuna á landabásinum annars. Nærri kunning um hetta verður send tykkum seinni.

# Farið til oljumessu í Aberdeen

**-Eg fari staðiliga at heita á vinnuna og kommunur um at standa saman um básin á oljumessuni í Aberdeen í heyst. Hetta sigur formaður í vinnu- og handilsnevndini í Runavíkar kommunu, Klæmint Østerø.**

OLJUMESSA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Klæmint Østerø, formaður í vinnu- og havnanevndini í Runvavíkar kommunu heitir staðiliga á vinnulívið og kommunur um at vera við á básinum á oljumessuni í Aberdeen í heyst*

Einans fýra fyritøkur vóru tilmeldaðar á básinum sum Uttanríkismálaráðið hevur bílagt á oljuráðstevnuni OE09 í Aberdeen í september. Orsøkin sigst verða dýra gjaldið fyri luttøku á básinum.

-Runavíkar kommuna hevur, síðani vónirnar um eina oljuvinnu í Føroyum veruliga tóku seg upp í ’98, verið umboðað á oljuráðstevnunum OE og ONS, sum verða hildnar annaðhvørt ár í Aberdeen og Stavanger. Runavíkar kommuna fer tíðskil at standa við og luttekur á básinum eisini í ár sigur Kæmint Østerø.

Hann vísir víðari á, at føroyski básurin á OE liggur yvirav básinum hjá “Aberdeen City Counsil” og hevur verið nógv vitjaður av fyritøkum innan oljuídnaðin og skotskum politikarum. Óformliga sambandið millum vinnufólk, embætisfólk, skotskar politikarar og føroyingar hevur givið okkum eina breiða vitan og fatan av teimum árinum, sum oljuídnaðurin hevur á samfelagið.

Runavíkar kommuna hevur støðugt arbeitt við at gera umstøðurnar hjá oljuvinnuni betri, og arbeiðir við einari langsiktaðari menningarætlan fyri vinnuni í økinum sigur formaður í vinnu- og havnanevndini.

Ítøkiliga hevur úrslitið m.a. verið, at einasta oljuútgerðarhavn liggur í Runavík og at fyritøkur í økinum hava ment seg til eisini at kunna veita tænastur til oljuídnaðin.

### Stóran týdning

Klæmint Østerø sigur víðari, at oljuvinnan hevur sum heild haft sera stóran týdning fyri føroyskt vinnulív. Seinastu árini hava føroyskar fyritøkur gjørt stórar íløgur í skip og vinnutól og kunnu veita oljuvinnuni tænastur í høgum støði og sum eru kappingarførar í dygd og kostanði. Alsamt fleiri fólk finna sær arbeiði í oljuvinnuni, serliga innan handverk, men eisini tá tað kemur til leiðslu.

Grundstøði fyri hesari menning hevur verið vónin um eina føroyska oljuvinnu og jaligi viljin hjá útlenskum fyritøkum mótvegis føroyskum. Onki er at ivast í, at trúgvin uppá olju í undirgrundini hevur hildið fyritøkum og oljufeløgum til at gera íløgur í og royndarboringar í føroyum.

Um ongin luttøka verður, og føroyski básurin á OE verður niðurlagdur, verður tað mett sum at føroyingar hava mist vónina um at finna olju. Tað eru ring tekin at senda oljuídnaðinum, at føroyskar fyritøkur og kommunur hava mist vónina um eina oljuvinnu í Føroyum, enntá beint frammanundan at borað verður aftur í Føroyum sigur Klæmint Østerø, sum heldur fram:

-Avbjóðingarnar broytast støðugt, og tí er neyðugt at verða við. Eftir mínum tykki er tað stórt spell, um básurin verður niðurlagdur.

Fleiri fyritøkur hava úttalað seg soleiðis, at tær vilja ikki luttaka á básinum, men heldur vitja ráðstevnuna og harvið eisini føroyska básin. Trupulleikin er bara um tað verður nakar básur at vitja, um hetta er holdningurin.

Eg fari tí staðiliga at heita á vinnuna og kommunur um at standa saman um básin á OE09.